# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Bjarni Olsen, timburmeistari,** ættaður av Válinum í Vestmanna, búsitandi á Argjum, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin, 73 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju hósdagin kl. 13. Tey ið ynskja at minnast Bjarna, kunna lata krabbameinsfelagnum eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Edith Dahl í Havn** andaðist mánadagin 93 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.
Erika Absalonsen í Klaksvík andaðist á Norðoyar røktarheimi mándadagin, 95 ára gomul. Kistan fer av røktarheiminum mikudagin kl. 18 heim í Betesda. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 13.30.

Jarðarferðin hjá **Niels Jákup Nielsen, Fámjin**, verður úr Fámjins kirkju mikudagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Niels Jákup kunnu lata Fámjins kirkju eina gávu. Konta í Føroya Banka.

**Petra Óladóttir,** fødd Biskopstø, ættað úr Klaksvík, fer til gravar úr Neskaupstaðar kirkju í Ìslandi í mikudagin klokkan 14.

**Judith Lindarstein**, ættað úr Skúgvi, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin, 81 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mikudagin klokkan 19. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum hósdagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Judith kunnu lata Deild 7 á Landssjúkrahúsinum, demensdeildina, eina peningagávu. Konta 160.026.7 í Føroya Banka.

**William Hansen í Klaksvík** andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi leygardagin, 85 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Betesda mikudagin kl. 13:30.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið kæri maður mín, pápi, verfaðir, abbi, langabbi og bróðir

**Jóhan Olsen**
við Gøtugjógv

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til tykkum, sum vóru um hann seinastu tíðina.
Tøkk til øll, sum hjálptu til við jarðarferð og ervi.
Tøkk fyri gávur til Gøtu kirkju, fyri blómur, kransar og heilsanir, og tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

*Familjunnar vegna*
**Marna**

### Dagurin

**28. februar. Hildigerð.** Høgt mett týsk abbadissa, sum doyði í 1179. Upprunaligt germanskt navn, samansett av orðum, ið merkja stríð og vernd.

# Bjarma Enghamar 50 ár

Í dag, 27. februar 2008, fyllir Bjarma Enghamar í Havn 50 ár. Bjarma er fødd og uppvaksin í Vági. Foreldrini vóru Edmund Joensen og Oliva Joensen.

Bjarma búði øll síni barnaár í Vági, men flutti á ungum árum til Havnar, og byrjaði at arbeiða. Væl hevur hon trivist, tí hon hevur búð í Havn síðan tá.

Í 1992, bert 34 ára gomul, fekk hon staðfest keðiligu sjúkuna sclerosu, sum gjørdi hana óarbeiðsføra. Men við sínum lætta lyndi og sterka vilja, hevur hon klárað seg framúr væl.

Bjarma eigur 4 børn: Virgar, Jørgen, Laila og Allan. Eisini eigur hon eina ommudóttir, Óluva, sum hon elskar at vera saman við, og hugna sær við. Hon er ommusa eygnasteinur.

Góða mamma og omma. Vit vilja við hesum ynskja tær hjartaliga tillukku við hesum stóra degi, og takk fyri alt tað tú ert fyri okkum.

Nevnast skal eisini, at elsti sonurin, Virgar, fylti 30 ár tann 26. februar 2008, og vilja vit eisini senda honum eina heilsan og ynskja honum hjartaliga tillukku við degnum.

Saman halda Bjarma og Virgar føðingardagarnir við at hava opið hús í Hattrick tann 29. februar 2008 frá kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.


*Bjarma og ommudótturin Óluva*

**Vinarliga**
**Virgar, Jørgen, Laila, Allan og Óluva**

# Carré í Focus

**Fríggjadagin 29. februar kl 16 letur ein framsýning við verkum hjá Philippe Carré upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn**

Philippe Carré er kendur fyri síni klipp í fuglaperspektivi. Hesaferð í Galerie Focus hevur Philippe Carré “miniature” ella smámyndir, tøknið er vatnlitir, tusj og blýant á pappíri.

Tað er ein roynd at tekna staðið við tí metaforiska ella ævintýrliga, og tí sermerkta við júst hesum staðnum. Hetta eru tulkingar av ymsum støðum í oyggjunum, ið eru teknaðar loddrætt og kunnu tulkast sum gongutúrar gjøgnum ávísar útvaldar gøtur. Landsløg ella býarlandsløg umskapast, so tað gevur eina kenslu av risastórum gomlum trøum, av drangur, klettum og oyggjum, av totemsteyrum og stórum skipum. Hvørt einstakt stað inniheldur heildina, eins og hvørt einstakt menniskja inniheldur mannaættina.

Framsýningin verður opin til 14. mars, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.


*Philippe Carré í Galerie Focus*